# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling - djúpt. Túrur nr. 1940
# 11/09-25/09-2019

**Fólk við frá Havstovuni:** Jens Arni Thomassen, Heri Kallsoy, Jákup Pæturssonur Dam, Marit Pedersen og Lise Helen Ofstad.

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad (toktleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Áherðsla varð løgd á at kanna m.a. brosmu, blálongu, gulllaks, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð skrásettur.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Vágslemmar. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini hósdagin 12/9 kl. 21. Vit byrjaðu við at taka støðir í ein landsynning úr Munkagrunninum fríggjadagin, áðrenn vit máttu leggja trolið á dekkið vegna veður. Byrjaðu at sigla ímóti Suðuroynni kl. 20. Lógu og krokaðu undir Suðuroynni leygardagin, meiri enn 25 m/sek av útsynningi suðri. Fóru út at royna sunnudagin 15/9, men vendu aftur vegna ov stóra aldu. Sigldu út frá frá landi mánadagin klokkan 7, og lógu síðani bakk vestan fyri á Munkagrunnin. Eftir at hava ligið bakk í meiri enn tríggjar dagar, varð trolandi aftur týsmorgunin kl. 6. Orsakað av veðri og hørðum streymi á Munkagrunninum, vóru fleiri hál føst og ikki góðkend. Mikumorgun varð trolað á Wyville Thomsonrygginum. Síðani á Føroyabanka, Bill Baileybanka (Ytrabanka), og vestan og norðan fyri Landgrunnin (Mynd 1). Nakrar støðir vórðu ikki tiknar, so sum tær fýra støðirnar á Lúsabanka (Ytstabanka) og 2 støðir við bankarnar. Í einari av hesum seinnu stóðu gørn og hin var ”kikarafisk-støðin”. Av hálum, sum ikki vóru góðkend, blivu trý tó kannað fyri at registrera fiskasløgini. Byrjaðu at sigla inn týsdagin 23. september kl. 23. Løgdu at á Havnini kl. 7:30 tann 24/9.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, egin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon *et al.* 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miða ímóti at alt er klárt í seinasta lagi 1. desember 2019.

**Fyribilsúrslit:** 76 ymisk fiskasløg vórðu skrásett. Um nøgdin í kg pr. støð verður samanborin við í fjør, so er nøgdin av gulllaksi og svartkalva nærum óbroytt, nøgdin av blálongu, stinglaksi og trantkongafiski nakað størri og nøgdin av brosmu og kubbuta langasporli nakað minni. Eins og undanfarin ár varð gýtandi gulllaksur fingin. Einans 44 støðir vórðu góðkendar av teimum 54 ætlaðu støðunum. 8 av teimum 24 eykastøðunum vórðu tiknar.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1940.

**Talva 1**. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum per slag

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKJAFTUR | 4229.368 | | | 32 |
| HAVMÚS | 2937.181 | | | 29 |
| GULLLAKSUR | 1688.839 | 281 | 69 | 36 |
| TRANTKONGAFISKUR | 1181.461 | 97 | 12 | 26 |
| HÝSA | 869.040 | 45 | 10 | 4 |
| GÓMAHOLSHÁVUR | 832.697 | | 5 | 14 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 709.447 | | | 23 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 600.560 | 22 | | 14 |
| BLÁLONGA | 580.059 | 154 | 55 | 31 |
| STINGLAKSUR | 512.944 | 132 | 10 | 13 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 511.156 | | | 23 |
| SKRUBBHÁVUR | 496.484 | | | 21 |
| SVARTHÁVUR | 307.664 | | | 2 |
| HÁKELLING | 300.000 | | | 1 |
| SVARTKALVI | 281.925 | 100 | 40 | 12 |
| SLÆTTHØVD | 273.856 | 7 | 3 | 8 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 216.020 | | | 13 |
| TINDASKØTA | 152.600 | | | 11 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 141.392 | | | 23 |
| MORA | 135.552 | 21 | | 14 |
| LONGA | 120.370 | 25 | 4 | 8 |
| TOSKUR | 92.860 | 12 | 11 | 5 |
| HAVTASKA | 89.785 | 11 | 5 | 8 |
| NEVHÁVUR | 82.496 | | | 9 |
| BROSMA | 82.235 | 36 | 6 | 20 |
| HVALSPÝGGJ | 74.198 | | | 21 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 72.309 | 25 | 8 | 14 |
| KALVI | 65.900 | 2 | 2 | 2 |
| HVÍTASKØTA | 50.575 | | | 5 |
| SVARTFISKUR | 41.839 | 2 | 1 | 8 |
| ÚLVFISKUR | 39.133 | | | 6 |
| TINDABAK | 36.367 | | | 1 |
| BLÁRIDDARI | 35.082 | 5 | | 17 |
| UPSI | 33.135 | 6 | 2 | 3 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 28.547 | 5 | | 10 |
| KIKARAFISKUR | 25.897 | | | 6 |
| LÍTLA BROSMA | 23.775 | 7 | | 6 |
| HALAHVASSA SKØTA | 23.110 | | | 2 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 12.138 | | | 5 |
| KLINGRUSKØTA | 10.256 | | | 7 |
| SANDSKØTA | 10.175 | | | 2 |
| FJAÐURFAGRA HAVMÚS | 10.134 | | | 5 |
| NEBBASKØTA | 8.205 | | | 1 |
| GLÝSUFISKUR | 7.396 | | | 2 |
| LÁLLA | 7.206 | | | 6 |
| ISHAVSSKØTA | 6.333 | | | 1 |
| BLÁGÓMUR | 6.245 | | | 1 |
| SILD | 5.524 | | | 1 |
| RONDSVARTI HÁVUR | 4.475 | | | 4 |
| SMÁSKRUBBUTI GLÁMUR | 3.803 | | | 3 |
| LÝSINGUR | 2.630 | 1 | | 1 |
| HVASSASPREK | 2.616 | | | 1 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 2.454 | | | 7 |
| REYÐKRABBI | 2.304 | | | 1 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| COLLETTS BÚKSVARTI HÁVUR | 1.750 | | | 1 |
| KLÆNASPORL | 1.687 | | | 7 |
| LÍTLIGLÁMUR | 1.255 | | | 7 |
| GLASKVOYSA | 1.176 | | | 1 |
| HEKSAKRABBI | 1.130 | | | 1 |
| SÆVARANGI | 1.051 | | | 6 |
| SILVURMURTUR | 1.018 | | | 6 |
| HULDUKRUTT | 0.925 | | | 1 |
| LOLIGO | 0.706 | | | 2 |
| GUNTERS LANGASPORL | 0.674 | | | 4 |
| SLOANS ORMFISKUR | 0.670 | | | 6 |
| PASIPHAEA SP. | 0.561 | | | 11 |
| SNÍPUÁLLUR | 0.553 | | | 5 |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 0.497 | | | 2 |
| SCOPELOGADUS BEANII | 0.244 | | | 5 |
| KLÓGVHØGGUSLOKKUR | 0.215 | | | 1 |
| SMÁTINDABAK | 0.210 | | | 1 |
| KAMI ÚLVFISKUR | 0.186 | | | 1 |
| KRYTTLINGUR | 0.157 | | | 1 |
| MJÁIKJAFTUR | 0.124 | | | 1 |
| MJÁANGI | 0.122 | | | 1 |
| BLÁLAKSUR | 0.076 | | | 1 |
| BOA-DREKAFISKUR | 0.065 | | | 3 |
| KROKODILLUPRIKKAFISKUR | 0.056 | | | 2 |
| MCDONALDS PRIKKAFISKUR | 0.056 | | | 1 |
| STÓRI PRIKKAFISKUR | 0.050 | | | 1 |
| HØGGUSLOKKUR ALLIR | 0.035 | | | 1 |
| TRANT LANGASPORL | 0.030 | | | 1 |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.016 | | | 2 |
| KNURRHANI | 0.004 | | | 1 |
| YMIST (ostur, skrambul v.m) | 208.597 | | | |
| Tilsamans | 18301.648 | 996 | 243 | |

**Viðmerkingar:** 100 íleguprøvar av svartkalva vórðu tiknir til eina verkætlan. Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar á imp-útskriftirnar.

Lise H. Ofstad